## Norðmaður ávegis til OB

Odense Boldklub hevur fingið fatur á einum sterkum norskum leikara, sum heima í Noregi verður mettur sum ein av bestu leikarunum í deildini. Talan er um áleyparan Bengt Sæternes, sum til dagligt spælir fótbólt í Bergen við felagnum Brann. Sæternes hevur sáttmála fram til oktubur, og fer ikki at leingja sáttmálan við Brann. Hann hevur leikt sjey landsdystir fyri norska landsliðið.



## Bellamy ávegis til West Ham

Síðani Liverpool keypti Fernando Torres, er tað blivið klárt, at Craig Bellamy ikki skal vænta sær alt ov nógva spælitíð í felagnum. Tí hevur slaturin gingið um, at Bellamy leitar sær eftir nýggja felag, og at Liverpool eru áhugaðir at selja, og nú tykist tað vera greitt, at Bellamy er ávegis til West Ham. West Ham hevur eftir øllum at døma boðið Bellamy eina vikuløn uppá knappar 800.000 kr. fyri at lokka hann til felagið. Bellamy fer helst at kosta West Ham knappar 100 mió. kr., og í árinum, sum hann hevur spælt fyri Liverpool, hevur hann skotið sjey mál.

# Bestu bogaskjúttarnir nakrantíð

**Ongantíð áður hava føroysku bogaskjúttarnir fingið so gott úrslit, og seymurin varð sligin fastur við eini gull og eini silvur medalju í liðkapping í gjár**

BOGASKJÓTING

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Manningin, sum hevur syrgt fyri besta úrslitinum í føroyskari bogaskjúttasøgu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Compound-liðið mannað við Sigrid Vang, Jógvan Niclasen og Per Holm Andersen tryggjaði í gjár Føroyum enn eitt gull heiðursmerki. Hitt liðið mannaðu Annika Vang, Hans Petur Højgaard og Absalon Hansen í recurve, og her rakk tað til eina silvurkrónu.

Tilsamans hava bogaskjúttarnir vunnið 11 heiðursmerki. Sjey gull, tvær silvur og tvær bronsu. Ongantíð áður hava so nógvir ørvar sitið so væl hjá so nógvum skjúttum. Orsøkin til hetta fantastiska flotta úrslit, er góða samanrenningin av heilt ungum og rættiliga royndum bogaskjúttum.

### Per á liðnum

Dagurin í gjár var teirra kappingardagur á Rhodos. Liðkappingin í head to head kappingini stóð á skránni. Liðini verða vanliga sett soleiðis, at teir skjúttarnir, sum hava staðið seg best í kappingini, mannað liðið sum skal kappast í hesi grein.

Tað var eisini tilfeldið hesaferð, men við einum undantaki. Schandorff Vang er royndasti bogaskjúttin hjá Føroyum, og vann eisini silvur í compoundkappingini frammanfyri eitt nú Per Holm Andersen. Kortini varð Per settur at skjóta í gjár, meðan Schandorff var eykaskjútti. Tað vísti seg ikki at vera nøkur býtt avgerð. Per skeyt nevniliga tað besta hann hevur gjørt í kappingini higartil, og átti sín stóra part av teimum at Føroyar fingu seinastu gullkrónuna í bogaskjóting.

– At skjóta liðkappingina bjargaði mínum túri, og eg eri heilt ófatiliga glaður fyri at fáa henda kjansin, segði Per Holm Andersen.

### Ogna Mogens úrslitið

Bogaskjúttarnir, sum hava staðið framúr gott á oyggjaleikunum, eru á einum máli um, at góða úrslitið skal ognast einum manni: Mogens Egholm, stovnarin av bogaskjóting í Føroyum, sum doyði fyri kortum.

– Hann skal heiðrast við hesum úrslitinum, siga tey við ein munn.



*Per Holm Andersen og Schandorff Vang fegnast um fantastisku úrslitini eftir kappingina í gjár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Heiðursmerkjabýtið hjá bogaskjúttunum:

**Sigrid Vang**
Compound Head to Head Knockout kvinnur, gull

**Sigrid Vang**
Single Compound kvinnur, gull

**Annika Vang**
Single Recurve kvinnur, gull

**Annika Vang**
Recurve Head to Head Knockout kvinnur, gull

**Jógvan Niclasen**
Compound Head to Head Knockout menn, gull

**Jógvan Niclasen**
Single Compound menn, gull

**Schandorff Vang**
Single Compound menn, silvur

**Hans Petur Højgaard**
Single Recurve menn, bronsa

**Absalon Hansen**
Recurve Head to Head Knockout, bronsa

**Føroyar**
Single Compound lið, gull

**Føroyar**
Single Recurve, silvur